vera nakað fyri teg, um tú er har úti onkustaðni, og fegin vil vita hvør eg eri, so skriva til mín og sig eitt sindur um teg sjálva. Eg bíði eftir tær. Eigur tú eina mynd av tær, so send hana við. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
*Bill. mrk. 571b*

## Súkklur

**HONDA X8R-S**
8 mðr. gamal til sølu fyri 18.000,- Nýprísur 23.750,- til sølu vegna keyp av bili.
*Tlf. 262404*

**KREIDLER KNALLERT**
til sølu, 3 gear, 50 ccm RMC til sølu fyri ein sámuligan prís.
*Ring 255591 ella 373625*

**YAMAHA**
'Skutari til sølu fyri 12.000 kr. Er 2 ára gamal og í tíðum standi.
*Tlf. 252369*

**VATNSKUTARI**
Ein 1 ára gamal Sea-Doo XP vatnskutari 130 HK, siglir uml. 65-70 MPH við vogni, sum nýggjur. Til sølu fyri 88.000 kr.
*Tlf. 220278*

**APRILIA RS 50**
árg. 2000 + ein eykalutur til sølu fyri 15.000 kr.
*Tlf. 226099, Søldarfjørður*

**SKUTARAHJÁLMUR TIL SØLU**
Vegna feilkeyp er ein skutarahjálmur til sølu. Merki AGV str. large, lítið brúktur.
*Tlf. 254550*

## Teldur

**TELDA TIL SØLU**
AMD Athlon K7 700 MHZ, 384MB pc-133 Ram, 20 GB hardisk ( 7200rpm ), 17" Litskermur, Grafikkort ASUS AGP-V7100 2 MX 32 MB við TV-OUT, Brennari CD-R/RW 4X4X32, Sony CD-Rom, Ljóðkort Sound Blaster Live, 2 Hátalarar við Subwoffer, LASAT Speed ll ISDN-2 Modem USB, Tastatur og trálest mús, MS XP Home Edition, MS XP Office, til sølu fyri 7000. Eri at hita á
*tlf. 447574*

**TELDA VIÐ AMD DURON**
1300 MhZ, 512 mb ram, Geforce 4, 64 mb ram við tv out, 40 gb. hd., netkort, 52x cd-rom til søu fyri 7.000 kr.
*Tlf. 320456*

**TIL SØLU**
Ein lítið brúktur Xerox printari til sølu fyri 1000 kr,- (Nýprísur 2400). Og ein scannari til sølu fyri 400 ,-.
*Tlf. 224655 - Karina*

**TILBOÐ**
Playstation 2 spøl. Eitt spæl 400 kr. ella tvey 500 kr. Dømi: 2002 Fifa world cup. Wrc-2 Extreme og nógv meir. Ring og ger kvettið.
*Tlv. 448097*

**TIL SØLU**
29 PS2 spøl til sølu – 300 kr. stk. 34 PS One spøl til sølu 150 kr. stk. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 257743*

## Tónleikur

**TIL SØLU**
Gittar effekt av slagnum Boss GT-3. Ein el-gittar av slagnum Ibanez RG Series. Ein el-kassa gittari av slagnum Vintage og ein kassagittari av slagnum Florensia.
*Tlf. 506940*

**MARSHALL TSL**
100 w rør guitarforsterkari til sølu. Øll rør skift fyri 4 mán. síðani. Nýprísur 11.000,- Fender telecaster Mexico til sølu. Nýprísur um 8.000. Til sølu samlað ella hvør sær til hægst bjóðandi.
*Tlf. 250900*

**ÚTGERÐ TIL BILANLEGG**
Forsterkari 130Wx4, forsterkari 100Wx2, basskanón 250W. Alt av merkinum Pioneer, verður selt samlað fyri 3.500 kr. ella hvør sær. Ring um prís.
*Tlf. 213067*

**URGULEIKARAFELAGIÐ**
7. mai kl. 19 verður aðalfundur í Vesturkirkjukjallaranum. Skráin fevnir um uppskot um samsýning o.a.

**GT6B-BASSPEDALUR TIL SØLU**
við nógvum góðum effektum, 8 mán. Nýprísur: 4.700 kr. Nú fyri 3.600 kr.
*Tlf. 260830*

**REOL-HÁTALARAR**
Sera vælljóðandi KEF RDM Two reol-hátalarar til sølu fyri 4.000,- kr. Nýprísur í 1999 kr. 13.000,-
*Tlf. 322299, eftir klokkan 17*

**SP-SOS SAMPLARI TIL SØLU**
1 ára gamal, ideel til live-performance. Nýprísur: 6.750 kr. Nú fyri: 4.800 kr.
*Tlf. 260830*

**TIL SØLU**
Midi keyboard til sølu fyri 1.000 kr. Lítið brúkt.
*Tlf. 260830*

**TIL SØLU**
Luxman rør forsterkari. Sony Minidisk. Sony cd.ES.. KENWOOD EKOULAISARI. Yamaha bandspælari. Nýprísur í 1994 var 27.000 kr., til sølu nú fyri einans 8.500 kr. við ca. 10 minidiskum. Ljóðar sera gott fyri prísin. E-mail: bjarni93@hotmail.com
*Tlf. 314473 Rói*

## Út- & Sjónvarp

**PIONEER CD-SPÆLARI**
2 ára gamal til sølu fyri 1990,- Nýprísur 2950,-
*Tlf. 441475 ella 255131*

**PARABOLUR TIL SØLU**
ongantíð brúktur, prísur 3.500 kr.
*Tlf. 361596*

**SONY BILRADIO**
við CD-changer pláss fyri 10 fløgum. Til sølu fyri 1.000,-
*Tlf. 310068*

## Ymiskt

**XP VANTSKUTARI TIL SØLU**
Vatnskutari og vognur fyri seg. Prís kunnu vit tosa um og við øllum tosa vit eisini um. Hevur siglt uml. 30 tímar.
*Tlf. 226880*

**ÁRLIGI MARKNAÐARDAGURIN**
í Sjónleikarhúsinum verður 24. mai. Hava tygum okkurt at lata, ber til at koma í Sjónleikarhúsið leygardagin 3/5, 10/5 og 17/5 kl. 13-14.
*Tlf. 311132*

**GIMBRAGONGAN**
Eigarar!! Gjaldið nú! 100 kr. gyllinin konto bt. 416.314-3.
*Hagastýrið*

**HEVUR NAKAR**
eina fartelefon av merkinum »Fujitsu C-5110 Lifebook« at selja mær. Tað er skermurin, ið eg skal brúka, so um hin partur er óvirkin ger einki.
*Ring á 253204*

**ROTTANGI**
kann fáast við at avheinta hann.
*Tlf. 315064 eftir kl. 18*

**BLACK & DECKER**
motor plenuklippari v/ uppsamlara, árg. 2002 til sølu fyri 1200. Glasfipur flaggstong 9 m. long, krevur ábøtur til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 312722*

**SPV-FARTELEFON**
Fyrsta fartelefonin við Windows. Hon hevur litskerm (65.000 litir), internet, e-mail, mms, msn messenger, mp3-avspælara, kan avspæla filmar og hevur øll møgulig spøl. Akkurát sum ein lítil telda. Við fylgir kamera, headset, 8 mb SD-kort, cradle og software. Virkar perfekt, einki sim-lock og er bert 6 mánaðar. Til sølu fyri bert 3.400,-
*ring 0045 26275314*

**KYNDIL**
Drigið verður um vinningarnar á málpartabrøvunum í hølum felagsins hósdagin 1. mai kl. 17.00.
*Kyndil*

**EIN MOTOROLA T720**
Fartelefon til sølu. Hevur litskerm og mangt annað. Fyri einans kr. 2.200,- nýprísur kr.3.000.
*Tlf. 224346*

**FLAG TIL SETHÚS YNSKIST**
Hevur onkur flag til eini sethús at selja okkum. Stødd 215 kvadratmetur. Vinarliga ring
*Tlf. 321180*

**DIGITALT MYNDATÓL**
Eitt Canon Ixus 300 til sølu fyri 3.500 kr. Myndatólið hevur 2,1 megapixel v/ 64 Mb korti og allari orginalari útgerð. Myndatólið er hálvtannað ára gamal. Nýprísur: 8.000 kr.
*Tlf. 220567*

**TIL SØLU**
Sodastream maskina + 6 fløskur fæst við at koma eftir tí.
*Tlf. 448402 - 218402*

**LÍF HEVUR EYDNUHJÓL**
í Fimleikarhøllini leygarkvøldið 3. mai. Møtið fjølment.
*Nevndin*

**FILMSLIÐ ÚR HAWAII**
vil koma í samband við føroying, um 20-25 ár, sum kann vera tulkur og hjálparfólk í smb. við filmsupptøkur í summar.
*T-post. duffin@post.olivant.fo*

**ER TAÐ NAKAR**
ið hevur kaffikoppar til Mågestellið at selja mær?
*Tlf. 317465*

**BROTFLÍSAR TIL SØLU**
Ein rest av brotflísum ca. 20-25 fermetrar til sølu fyri 2100 kr.
*Tlf. 311105*

**TIL SØLU**
PACE matarstýring til sølu fyri 500,-
*Tlf. 318888 eftir kl. 18*

**MÁLNINGAR**
eftir Mikines, J. av Reyni, Eyðun av Reyni, Steffan Danielsen og Frimod Joensen o.a.
*Tlf. 213245*

**TIL SØLU**
10 stk. gamlir radiatorar, 1 stk. úthurð, 1 stk. wc-kumma.
*Tlf. 328138 eftir kl. 17*

**HEY**
Hava tit klæðir, bøkur ella onnur brúksting, ið tit vilja sleppa av við, vilja vit fegin avheinta tað. Í Havn tlf. 267704. Í Vágunum tlf. 255669.
*02.b*

**STJERNE FOR EN AFTEN**
Atgongumerki til konsertina í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 10. mai til sølu fyri 125 krónur. (vanligur prísur 195,- kr.)
*Tlf. 219994*

**TIL SØLU**
Skúrur til sølu um hóskandi boð fæst. Klæddur við jarnplátum og nýtjøraður.
*Tlf 218011 ella 757322*

**FERÐASEÐIL TIL SØLU**
Apex ferðaseðil við AA til Keypmannahavnar til sølu við avsláttri.
*Tlf. 421109*

**URTAGARÐSMOLD**
Góð urtagarðsmold fæst við at ringja
*Tlf. 218328*

**TIL SØLU**
Eitt 128 l. akvarium til sølu, alt uttan fiskar fylgja við.
*Tlf. 211532 eftir kl. 17*

**NOKIA 6510**
Sera hent telefon. Hevur m.a. FM Radio, til sølu fyri 1.400 kr.
*Tlf. 213067*

**PLAST VINDEYGU OG HURÐAR**
Vit selja plast vindeygu og hurðar í øllum støddum. Týskt framleidd, ið lúka øll ásett krøv. Ring, meyla ella faxa og fá eitt tilboð.
*ImpaX, impax@impax.fo, Tlf. 318700/228700 Fax. 318*

**ERICSSON T66**
fartelefon lítið brúkt, vigar einans 59 g. til sølu fyri 1200.- kr.
*Tlf. 504840*

**VIÐ »SØKONGEN«**
til føroysku útróðrarplássini í Grønlandi – 2 pláss eru eftir til áhugaverda túrin 24. juni til 8. juli. Tlf. 371972 ella 254752.
*weymyr@post.olivant.fo*

# Kondittaríið skal lata uppaftur



*Nú vilja havnafólk, at Konditaríið skal lata uppaftur. Rakel Helmsdal og Jákup Veyhe eru farin at savna undirskriftir inn, sum skulu latast eigaranum, Miðbýarfelagnum og Býráðnum*

**Nú er stig tikið til at fáa Konditaríið, sum fyri stuttum stongdi, at lata uppaftur. Rakel Helmsdal og Jákup Veyhe eru farin undir at savna undirskriftir inn**

ÓNØGD
*Ingrid Bjarnastein*

Tað eru mong, sum lata illa at, nú Konditaríið fyri stuttum snaraði lyklinum fyri seinastu ferð. So illa verður latið at, at nú eru stig tikin til fyri at fáa Konditaríið at lata uppaftur.

Rakel Helmsdal og Jákup Veyhe eru farin undir at savna undirskriftir inn. Hesar undirskriftirnar skulu vera við til at hjálpa at lata Konditaríið uppaftur í sama líki, sum tað var áðrenn tað lat aftur.

– Vit hava hugsað um hetta leingi, og nú hava vit so tikið stig til hetta, sigur Rakel Helmsdal.

– Man má byrja onkustaðni, so vit byrja her. Vit fara at handa hesar undirskriftirnar til Miðbýarfelagið, Heina Restorff, sum eigur Konditaríið og Býráðið.

Stigtakararnir meta tó, at tað er eigarin av Konditarínum, sum hevur ábyrgdina av, at fáa tað at lata uppaftur.

### Stórur saknur

– Saknurin er stórur nú Konditaríið ikki er har meira. Tað er júst um eitt hol – har vantar okkurt. Gongugøtan er als ikki livandi longur. Bara handlar kunnu ikki halda eini gongugøtu livandi, heldur Rakel, sum vísir á, at nú er onki stað at møtast í sjálvari gongugøtuni.

Rakel heldur, at saknurin man vera uppaftur størri hjá teimum, sum hava sitið har hvønn einasta morgun til morgunkaffi í ein mansaldur.

– Sjálv havi eg altíð gingið regluliga inn á Konditaríið og míni børn eru mestsum vaksin upp har, sigur Rakel, sum tó ásannar, at tað verður ikki tað sama uttan tær damurnar, sum hava rikið Konditaríið seinastu mongu árini.

– Vit vilja hava Konditaríið sum Konditaríið. Ikki sum eina matstovu ella eina barr, men soleiðis sum tað altíð hevur verið. Óhátíðarligt. Tí soleiðis er tað inni har. Og um karmarnir eru í lagi, so er bara at vóna, at tey, sum kanska fara at reka Konditaríið fara at reka tað á sama hátt.

Stigtakararnir vilja hava Konditaríið at lata uppaftur so skjótt sum møguligt.

– Tað verða nógv syrgin lesandi, sum koma heim í summar. Inni á Konditarínum kennir ein seg heima, tú hittir altíð onkran inni har, sigur Rakel Helmsdal at enda.

Visti tú ikki tað? Sosialurin



# Stovnaðu felags ferðavinnufelag í Suðuroynni

**Týskvøldið var stovnandi fundur av ferðavinnufelag í Suðuroynni, har allar kommunur í oynni, saman við Ferðaráð Føroya, stovnaðu felagið Ferðavinnan í Suðuroy. Felagið skal reka kunningarstovur í Vági og á Tvøroyri. Fundurin kom eisini ásamt um yvirlýsing, ið m.a. mótmælir, at tyrluflúgvingin til Suðuroyar verður niðurløgd, og greitt er nú, at suðuroyingar fara at krevja fleiri túrar sjóvegis**

FERÐAVINNA
*Dagfinn Olsen*



*Kommunur í Suðuroynni, Ferðaráð Føroya og ferðavinnuáhugað, vóru á fundi í Sumba týskvøldið. Har var stovnandi aðalfundur fyri felagið Ferðavinnan í Suðuroy, sum skal reka kunningarstovur. Fundurin samdist um yvirlýsing, har nógv skerda ferðasambandið verður mótmælt*

*Mynd: D. Olsen*

Týskvøldið varð nýtt felag stovnað, felagið Ferðavinnan í Suðuroy. Á fundi í Sumba stovnaðu kommunurnar í Suðuroynni felagið, í samstarvið við Ferðaráð Føroya.

Hetta er royndin at menna ferðavinnuna í oynni á allar hugsandi hættir og rekast skulu kunningarstovur á Tvøroyri og í Vági, sum arbeiða fyri alla oynna. Frammanundan er kunningarstova á Tvøroyri.

Per Hansen, Ferðaráðið, varð valdur fundarstjóri, og greiddi hann frá, at arbeitt hevur verið við ætlanini eina tíð, og eftir at viðtøkur felagsins vóru havdar frammi til viðmerkingar og síðani góðkendar, varð komið til val av nevnd.

Kommunurnar høvdu gjørt av, hvør skuldi umboða tær í felagnum. Fyri Porkeri komu Hilmar Bech í nevndina og Lars Djurhuus er eykalimur. Fyri Hov er Ásbjørn Berg valdur og eyka er Niels Hammer. Fyri Famjin er Elin Nielsen og Arni Nielsen er eykalimur. Fyri Hvalba situr Elberg Klettheyggj og Áki Bertholdsen er eykalimur. Fyri Sumba er Snæbjørn Vestergaard valdur og eyka er Poul Johannus Poulsen. Fyri Vág er Jógvan Krosslá og eykalimur er Petry Joensen. Fyri Tvøroyri er Kristin Michelsen og eykalimur er Jonny Dimon.

Nevndin skipaði seg eftir fundin við Ábjørn Berg sum formanni, Elini Nielsen sum næstformanni, Elberg Klettheyggj er kassameistari og skrivari er Hilmar Bech. Nevndarlimir eru sostatt Jógvan Krosslá, Kristin Michelsen og Snæbjørn Vestergaard.

Til Grannskoðara er Bókhaldsstovan Bisty við Hildur Gunnarsdóttir í Hovi vald.

Valt var at halda fram, sum gjørt hevur verið frammanundan, viðvíkjandi limagjøldum. Og tað merkir, at einstaklingar rinda árliga 100 krónur í limagjaldi, feløg 400 krónur og fyritøkur og stovnar 1000 krónur. Kommunurnar hava rindað 15 krónur árliga fyri hvønn íbúgva, men er hetta hækkað til 30 krónur.

Ferðaráðið rindar á leið 80.000 krónur, tað eru 16 krónur fyri hvønn íbúgva í kommununum.

Eftir at allir snøklar viðvíkjandi stovnanini vóru avgreiddir, fegnaðist fundarstjórin Per Hansen um, at kommunurnar taka

Framhald á síðu 11


Peugeot 307 – nú á goymslu



PEUGEOT

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 34 54 00